

# KT-fólk

## Statoil Føroyar søkir eftir fólki til KT-deildina

### Starvið
Sum KT-fólk arbeiðir tú í tøttum samstarvi við KT-leiðaran, og tú fært stóra ávirkan á arbeiði títt. Virkisøkið er ógvuliga breitt, og vit samstarva eisini nógv við KT-deildirnar hjá altjóða Statoilsamtakinum.

### Arbeiðsuppgávur
Tú fært ein fjølbroyttan arbeiðsdag, har fáir dagar líkjast. Nakrar av uppgávunum eru at:

- Vegleiða og hjálpa brúkarum okkara at nýta KT-skipanir
- Menna, reka og viðlíkahalda KT-skipanir og teldur
- Vera við í KT-verkætlanum og greina KT-skipanir
- Vera við í hagtalsarbeiði hjá KT-deildini
- Samskipa og menna skjalfestingina av okkara KT-skipanum

### Tínir førleikar
Tú dugir tíni KT-ting, og uppaftur betri, um tú hevur viðkomandi útbúgving. Tú ert sjálvandi arbeiðssamur, og so ert tú fyrikomandi og dugir væl við fólki. Tað er neyðugt, at tú dugir væl at samstarva, og at tú eisini arbeiðir sjálvstøðugt.

### Okkara tilboð til tín
Vit bjóða tær eitt gott starv við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Vit leggja dent á, at fólk sleppur at røkja sínar fakligu dygdir, og tí bjóða við tær góðar skeiðsmøguleikar, bæði hjá Statoilsamtakinum sjálvum – heima sum burturi - og á skeiðum, sum onnur skipa fyri.

Lønin verður ásett eftir royndum og útbúgving, og eftirlønartrygging fylgir við starvinum. Tú hevur tilvísing til KT-leiðaran.

### Hevur starvið tín áhuga?
Vilt tú vita meira um starvið, er tú vælkomin at seta teg í samband við Eyðun Lamhauge, KT-leiðara, ella Sverra Kallsberg, fíggjarleiðara, á telefon 34 35 00.

Send eina umsókn í seinasta lagi 10. oktober 2006 til eyl@Statoil.com, ella send vanligt bræv við frámerkinum "KT-fólk" til:

P/F Statoil Føroyar
Postboks 3098
FO 110 Tórshavn

Umsókn tín verður viðgjørd í trúnaði.

Endamálið hjá Statoil Føroyum er at veita brúkarunum í Føroyum oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða umleið 150 fólk.Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.

REPROZ

STATOIL
– fyri viðskiftafólk okkara



SMYRIL LINE
EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

## VINN EINA SKÍÐFERÐ FYRI 2 VAKSIN OG 2 BØRN FRÁ SMYRIL LINE



### Kavaárstíðin í Hemsedal
Fjøllini í Hemsedal verða ofta rópt fyri »Tær Skandinavisku Alpurnar«. Hemsedal liggur ímillum Oslo og Bergen, og verður eisini nógv vitjað av ferðfólki frá Danmark, Svøríki og Onglandi. Kavaárstíðin í Hemsedal er frá novembur og heilt fram til 1. mai.

### Dagsins spurningur
Hvussu leingi er kavaárstíðin í Hemsedal?

- ☐ 5 mánaðir
- ☐ 6 mánaðir
- ☐ 7 mánaðir

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Tlf. nr: ____________________

Sendi okkum loysnina til:
Sosialurin
Postmoga 76
110 Tórshavn
Merk brævbjálvan »Skíðkapping«

Í samstarvi við Smyril Line fara vit hvønn dag í 14 dagar at skipa fyri eini spurnarkapping. Nýggjur spurningur verður hvønn dag í Sosialinum. Jú fleiri svar tú sendur inn, jú fleiri møguleikar hevur tú at vinna. Svarlepin skal tó vera kliptur úr blaðnum – avrit verður ikki góðtikið. Seinasta freist at senda inn er mikudagin 18. oktober. 2006.

**Vinningur:** Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili á leiðini Tórshavn-Bergen og aftur í 4 koyggjukamari við vindeyga og wc/bað. Allar máltíðir umborð eru íroknaðar. Hartil 9 nætur í íbúð fyri 4 persónar á Fleischers Apartment í Voss í Noregi. (máltíðir ikki íroknaðar). Virðið á ferðini er uml. kr. 11.995,-.







VIRÐI:
11.995,-

Sosialurin